Røða hildin á vestanstevnu:

# Sørvágur er mín næsta heimbygd



**Vilhelm Johannesen**

Gott fundarfólk!
Góðu sørvingar, vágafólk og stevnugestir!

Fyrst skal eg takka hjartaliga fyri, at eg varð biðin um at halda røðu á midnáttarsamkomuni á Vestanstevnuni 2001. Eg geri tað fegin og kenni tað sum ein stóran heiður, at halda røðu fyri tí stóru mannfjøld, sum hevur leita sær oman á Sandin í Sørvági hesa góðveðursnáttina.

Hóast eg eri klaksvíkingur – føddur, uppvaksin og búsitandi har, so hevur Sørvágur altíð staðið mínum hjarta nær – verið mín næsta heimbygd, ella sum onkur vildi sagt, mín heimbygd nr. 2. Sum smádrongur kom eg her hvørt summar. Eg minnist torvroykin, ið kom upp gjøgnum ljóðarin í hvørjum húsi í bygdini, og sum beyð mær vælkomnum til Sørvágs, tá eg steig út úr bussinum her uppi á Pølsoyruni.

Eg minnist spæl her á sandinum. Her uppi á sandinum var tað fótbóltur, hond-bóltur, kapprenning og lop. Longur niðri á sandinum bygdu vit sandborgir, fangaðu állar og tarabrosmur, vit vassaðu langt út eftir sandinum, men heiman-ífrá vistu vit, at vandaleysur var sandurin ikki, tí marrbakkin var har, og fór vit út av honum, so var eitt bládýpi undir okkum.

Eg minnist eisini at vit royndu eftir smásílum og állum, bæði í Stórá og í Kirkj-ánni, somuleiðis minnist eg løtur í Kongshyli og í Djúphyli. Um kvøldarnar róku vit neytini heim frá útrakstrinum úti í Geilini. Eg minnist torvarbeiði Norði á Mýrum, eg minnist aðrar torvheiðar, t. d. Norði á Nakki, Niðri í Gyl, í Sortudíki o. s. fr., eg minnist gongutúrar oman á vatnið og oman í Vatnsoyrar, norður á Fjallavatn, út í Selvík og til Bíggjar. Og sjónin vit sóðu og framvegis síggja úr Bø gongur ongantíð frá mær:

Har síggja vit Drangin og honum undir lið Tindhólm við teimum fimm tindunum: Ytsti, Arni, Lítli, Breiði og Bogni. Síðani síggja vit Gáshólm og Skerhólm. Longst í vestri síggja vit Mykines, og góðveðurskvøldini kundu vit eisini síggja blunkini frá vitanum í Mykineshólmi. Eg minnist eisini løtur, tá vit vóru á støð úti á Bakka, har bátarnir ofta løgdu gylta veiðu upp á land. Miðini teir royndu tá vóru: Guttamið, Grynnan og Grunnurin. Guttamið eitur eftir Guttormi løg-manni, ið fann hetta mið, eina ferð hann kom aftur av uttanlandsferð.

Ein av motorunum, sum tá róði út úr Sørvági, var motorbáturin »Selvík«, sum kom til bygdina í november 1914. Tað er gleðiligt at síggja, at hesin bátur nú stendur á sandinum, er settur í stand og hevur fingið upprunaligu útsjóndina aftur. Motorarnir og útróðurin er ein partur av bygdarinnar søgu. Tí vil eg nýta høvið at fegnast um hetta tiltak, at varðveita ein deksbát ella ein motor, sum vanliga varð sagt, og harvið tann partin av søguni her í Sørvági. Eg skal nýta høvið at ynskja tykkum tillukku og góða eyðnu við tiltakinum.

Eg minnist eisini gamlar menn, sum góðveðurskvøldini sótu á garðinum fram við vegnum, har brekkan gongur frá Pølsoyruni oman á Sand. Teir flestu vóru í knæbuksum og morreyðari troyggju, onkur í koti, og fleiri høvdu føroyska húgvu á høvdunum. Har sótu teir og skiftu orð um ymiskar trupulleikar, bæði heimligar trupulleikar og um trupulleikar burtur í heimi, har tosaðu teir eisini um útróður, um fiskiskap annars, um føroysku stórhvalaveiðuna sum tá var í sínum vælmaktsdøgum o. s. fr. Teir bóru og fingu tíðindi frá hvørjum øðrum.

Eg upplivdi eisini at vera næmingur í gamla skúlanum í Sørvági. Har vóru bert tvær skúlastovur. Har vóru einans tveir lærarar og fýra flokkar. Lærararnir vóru Dánial Danielsen, vanliga nevndur DD ella bara lærarin, og Napoleum Petersen, vanliga nevndur Pola. Jú, barna- og ungdómsminnini úr Sørvági eru mong og fjøllbroytt, og koma ofta fram í mínum tonkum; hetta eru rík minni at eiga.

Frá araldstíð komu føroyingar saman í Tinganesi at halda ting. Seinni gjørdist hetta ólavsøkan ella tjóðarhátíð føroyinga. Upprunaliga komu teir saman at gera lógir, at ansa eftir at lógirnar vórðu hildnar, at døma fyri lógarbrot, at keypa og selja o. s. fr. Men teir komu eisini saman, tí teir vildu hittast at loysa heimsins trupulleikar og at halda sær at gamni. Teir tóku brókatøk og róðu kapp. Hetta var ein náttúrligur partur av mentan føroyinga.

Umframt ólavsøkutingið á Tinganesi í Havn, fóru føroyingar eisini at halda ting úti um landið, og søgnin sigur, at hvørt høvdingadømi hevði sín tingstað, og seinni hevur eitt ting verið í hvørjari sýslu. Søgn er, at gamli tingstaðurin her í Vágum, var inni á Gálga, sum er á markinum millum Sandavág og Miðvág. Har á staðnum stendur enn í dag ein stórur steinur, ið verður nevndur Gálgasteinur, og helst eru deyðadómar framdir har. Í søguligari tíð hevur tingstaðurin í Vágum verið á Ryggi í Miðvági. Hetta kunnu vit lesa um bæði í Miðvágs- og í Sanda-vágssøgu.

Somu bøkur siga, at í 18. øld hevur Várting verið á Ryggi í Miðvági, Heystting hevur verið í Sørvági og Vetrarting hevur verið á Steig í Sandavági. Vanligt var eisini tá í tíðini, at ástaðarrættur varð settur, t. v. s. at tingið varð sett á staðnum, har dømast skuldi í einum trætumáli. Vit hava dømi um, at sonevndi ástaðarrætturin varð settur við Tjørndalsegg norðan fyri Vatnsoyrar í 1746, at taka støðu í einum trætumáli millum vestmenningar og sørvingar øðrumegin og mið-vingar og sandavágsmenn hinumegin. Trætan snúi seg um gøtuna og gongdina millum Oyrargjógv og Sørvág.

Vit hava eisini onnur dømir um, at føroyingar hava leita sær saman til gaman og álvara. Í summum pørtum av landinum vórðu onkrar bygdir skýrdar jólabygd-ir, aðrar nýggjársbygdir, uppaftur aðrar trettandabygdir ella kyndilsmessu-bygdir. Hetta merkti, at hesar ávísu dagarnar vóru bygdirnar vertir fyri vitjandi úr øðrum bygdum, helst úr grannabygdunum. Onkunstaðni í landinum varð hesin siður varðveittur heilt inn í 20. øld. Sum dagarnir siga frá – teir røkka frá jólum til kyndilsmessu – var hetta í vetrahálvárinum ella í dansitíðini.

Í síðsta fjórðingi av 19. øld, tá tjóðskaparrørslan fór at gera vart við seg her á landi, varð tann siður tikin upp, at skipa fyri útferðum og fólkafundum ymsa staðni kring oyggjarnar. Hesir fundir høvdu síni ávísu endamál. Tey, sum skipaðu fyri, vildu bjarga føroysku fólkasálini – ansinum fyri føroyska málinum, fyri serstøku føroysku mentanini og fyri nátúrini. Men tíðin stendur ikki í stað, og sum sagt verður, nýggjar tíðir krevja nýggjar siðir. Gildini, fólkafundirnir og dansiferðirnar vórðu avloyst av summarstevnunum.

Ólavsøkan var og er stevnan har fólk úr øllum landinum komu einaferð um árið. Men úti um landið vildu fólk eisini gera sínar »Ólavsøkur«. Á jóansøku 1899 høvdu vestanmenn fingið ta hugskot, at skipa fyri fyrstu fólkafundar- og ítróttarstevnuni. Vestanmenn tá í tíðini vóru vestursíðan av Streymoy, Koltur, Hestur, Skopun, Vágoy og Mykines. Á hesi stevnu var, umframt fólkafund sum vera man, bæði kappróður, kappríðing, kapprenning o. a., sum kundi kallast ítróttur tá í tíðini. Tann stevnan varð hildin í Miðvági.



Eina tíð skipaðu suðuroyingar fyri egnari Ólavsøku har suðri. Hetta gjørdu teir til teir fóru at skipa fyri egnari stevnu á jóansøku. Fyrsta jóansøkan var á Tvør-oyri í 1925. Jóansøkan hevur síðani verið hildin á hvørjum ári. Annaðhvørt ár á Tvøroyri og annaðhvørt ár í Vági. Í 1936 komu norðingar og klaksvíkingar við síni norðoyarstevnu sum verður hildin í Klaksvík á hvørjum ári.

Fyrsta Vágastevnan varð hildin niðri á vatninum í 1945. Har var kappróður, kappríðing, kapprenning, togtogan o. a. Tey fyrstu árini vóru tað bygdirnar í Vágum sum stóðu fyri stevnuni og tí bar hon heitið Vágastevnan. Seinni skiftið stevnan ímillum bygdirnar Sørvág, Miðvág og Sandavág. Og uppaftur seinni koma Vestmanna við og tá broytti stevnan navn til Vestanstevnan.

Nú verða so allar hesar stevnurnar hildnar á hvørjum ári. Fyrst norðoyastevnan, síðan skálafjarðarstevnan, so jóansøkan, varmakeldustevnan, sundalags-stevnan, vestanstevnan og at enda kemur so sjálv tjóðarhátíðin Ólavsøkan, ið savnar fólk úr øllum landinum – ja, hon savnar so at siga alla tjóðina.

Áðrenn eg sleppi hesum partinum vil eg nýta høvið til at heilsa og fagna okkara ítróttarungdómi. Tit seta ein serligan framúr góðan dám á allar hesar stevnurnar. Úrslitið á oyggjaleikunum á Man sigur ikki so lítið um tykkara ídni og dugnaskap. Heili 15 gullmerki, 14 silvurmerki og 12 bronsumerki, umframt tað, at vit vunnu kappingarnar í kvinnufótbólti og flogbólti fyri kvinnur. Eitt frálíkt úrslit, sum vit kunnu fegnast um, og vera errin av.

Í 1200 ár lógu føroyingar avbyrgdir úti í Atlandshavinum og her varð tann føroyska fólkasálin skapt. Við einum støðugum fólkatali upp á umleið 5000 upp gjøgnum miðøldina hava vit varðveitt og ment okkara mál og okkara mentan. Her varð tann føroyski samleikin (identiteturin) skaptur.

Útróður og bóndalív, kvæði og sálmasangur, landfarsóttir, sjólát, tuberklar í trongum skipslugarum og stórur barnadeyði hava skapt eina sterka, men eisini eina viðkvama fólkasál. Tað viðkvama sæst aftur í stórum listarligum gávum innan allar listagreinar. Tað sterka sæst aftur í okkara evnum at yvirliva skift-andi tíðir. Til lands í Íslandi – útróður í Grønlandi – við íslendskum trolarum – við bretum – við týskarum – við norðmonnum. Á útlendskum arbeiðsplássum og á fremmandum læristovnum.

Okkara flagg ímyndar tey samhaldsføstu virðini vit eiga. At vit varða av hvørjum øðrum. At ongin líður neyð í okkara landi. At vit taka okkum av teimum minni mentu og veiku í samfelagnum. At tær sterku herðarnar bera tær lutvíst tyngru byrðarnar. At øll eiga rættin til eitt virkið lív. At øll fáa møguleikan at nema sær útbúgving. Hetta eru alt virðir, sum gera, at okkara land telist millum tey góðu londini at búgva í. Virðir, sum gera, at vit eru errin av at vera føroyingar.



Vit eiga ikki at lata eginsinnið – egoismuna – fáa fastatøkur á okkum, tí tá skapa vit eitt sjúkt samfelag, sum skjótt fer til grundar. Vit mugu í góðum felags-skapsanda skapa eitt samfelag, har pláss er fyri øllum. Vit eiga at sannføra hvønn annan um, at tað ber til at byggja eitt samfelag upp í felag, eitt samhaldsfast samfelag við sjálvsáliti og sjálvsvirðing.

Men vandi er í hvørjari vælferð. Tá ferðin er stór, er týdningarmikið at ansa eftir, at vit ikki missa okkum sjálvi burtur, at vit ikki gloyma tað góða og gamla, sum vit fingu í arv frá okkara forfedrum. Eg kann ikki lata vera við at taka fram ta vøkru náttúruna sum eyðkennir okkara land. Í framtaksferðini gloyma vit ofta at halda fast við náttúruvirðini.

Um vit í øllum vinnulívsmeldrinum drepa lívið í vøtnunum, dálka firðir og sund so nógv, at dýralívið og sjóplantuvøksturin í fjøruni verður burtur, at ávís fiska-sløg hvørva og ikki koma aftur, og annað týdningarmikið lív á firðunum doyr, tá missa vit meira fyri minni. Okkara umhvørvi er bygt upp gjøgnum túsundir av árum, men nútíðin kann eftir stuttari tíð oyðileggja so nógv, at komandi ættarlið als ikki fáa møguleika fyri at fegnast um og gagnnýta hesa gávuna. Lat okkum altíð minnast, at tað, sum vit umsita, er ikki ein arvur ella ein gáva frá okkara forfedrum, men eitt lán frá okkara eftirkomarum.

Fer framburðshugurin fyrilitaleyst at hava við sær dálking og spillu av vøkru nátúruni t. d. av Sørvágsvatni og Fjallavatni og av fjøllum og dølum her um leiðir, so kann eftirtíðin av sonnum kalla okkum nakrar rásnkroppar og tað má ikki henda. Um allan heimin stríðast felagsskapir, lond og landspartar fyri at av-marka oyðileggingina av nátúruni. Vit hoyrdu herfyri um ósemjuna millum risaveldið USA og Europa um Koyotuavtaluna. Henda avtala áleggur øllum londum at minka CO-2 útlátið, so at tað innan ávíst áramál er heilt burtur.

Vísindafólk duga at síggja, at bera vit okkum ikki skilagott at, so er stórur vandi fyri, at okkara ættarlið fer at ræna framtíðina frá teimum, sum aftaná koma og skulu búleikast her. Sjálvandi skal okkara lítla tjóð eisini vera við í arbeiðnum at verja heimssamfelagið móti týning. Vit kunnu ikki longur siga, at vit eru so fáment, og at tað lítla, sum vit dálka, bert er ein evarska lítil dropi í tí stóra hav-inum. Spurningurin er ikki, hvussu fáment vit eru, men heldur er spurningurin hvørja sjálvsvirðing vit hava, og hvørja virðing vit hava fyri jørðini og okkara upphavi.



Fyri at tríva í eitt av teim aktuellu málunum, skal eg her móti endanum nevna, at í farnu viku varð fyrsti borðurin settur í føroysku undirgrundina. Um nakr-ar mánaðar fáa vit so at vita, um olja er í undirgrundini, og tey flestu vóna, at so verður og fegnast um og síggja fram til, at svarta gullið fer at spríkja burtur úr havbotninum. Men sum orðatakið sigur: Tað er vandi í hvørjari vælferð. Og her kann vandi eisini vera á ferð.

Gera vit onki fyri at verja okkum, er stórur vandi fyri, at oljuvinnan fer at koma føroyska samfelagnum aftur um brekku. Ein vandi er, at peningaumfarið í samfelagnum gerst alt ov stórt við tí úrslitið, at vit fáa eina ótálmaða nýtslu, at sethúsaprísirnir og prísirnir á byggijørð rúka upp í loft, at vit fáa stórt hall á handilsjavnanum og gjaldsjavnanum, at tað almenna, kommunurnar og tað pri-vata fara at gera alt ov stórar og kostnaðarmiklar íløgur við tí úrslitið, at okkara høvuðsvinna og onnur framleiðsluskapandi og útflutningsfremjandi vinna verður sindrað.

Um oljuvinnan gerst umfatandi, og kemur at fevna um eitt drúgt áramál, eru eisini aðrir og størri vandar á fer. Tá verður vandi fyri, at vit koma í ta støðu, at ongin longur dugur at fiska. At ongin longur dugur at framleiða vøru til útflutnings burtur úr ráfiski. At ongin dugur at arbeiða í landbúnaðinum, í ídnaði, sum ikki hevur beinleiðis við oljuvinnuna at gera, og hvat skulu vit gera við oljuídnaðin, tá oljukeldurnar eru tómar? Sannleikin er tann, at avleiðingarnar av oljuvinnuni, um vit ikki binda um heilan fingur nú beinan vegin, kunnu gerast heilt óhugnaligar.

Bera vit okkum rætt at, kann oljuvinnan verða til stórt gagn, bæði fyri okkum, sum nú liva, og fyri tey komandi ættarliðini. Hon kann gagna føroyska samfelagnum langt inn í framtíðina. Men bera vit okkum skeivt at, er stórur vandi fyri, at hendan vinnan sum frálíður førir okkum út í stóra neyð og armóð. Hon kann gera enda á føroysku tjóðini. Og her eiga vit at vera á varðhaldi. Vit eiga at sláa manngarð um okkara mál, okkara mentan og okkara siðsøguliga arv. Hetta er helst størsta avbjóðingin føroysku tjóðini hevur verið fyri nakrantíð. Hetta er ein avbjóðing til fólkið í Føroyum – til føroysku tjóðina.

Nú eru vit í veitslulagi. Ungdómur og manndómur og eldra fólkið, sum hevur lagt arbeiðsdagin afturum. Vit eru savnað til ítrótt. Tey yngru luttaka og hini hyggja at. Vit syngja saman, tala saman, heilsa uppá hvønn annan o. s. fr. Vit hittast í eini aðrari tíð og á ein øðrvísi hátt enn forfedrarnir. Men hugurin at hittast er hin sami, og vit føroyingar eiga eisini í framtíðini at kenna okkum sum teir grannar, ið koma hvørjum øðrum við. Grannar sum hava gleði av at hittast, at tala saman, syngja saman og syrgja saman, tá tær tungu løturnar í lívinum koma.

Lat meg enda við at ynskja Guðs signing yvir land og fólk og at ynskja tykkum øllum eina framhaldandi góða vestanstevnu.

Takk fyri!